# Ítróttarfelag Fuglafjarðar




## ÍF - Sumba

LANDSKAPPING

Leygardagin 24. august 2002

Kl. 14.00 í Fuglafirði

HAVSBRÚN

TOR SHIPPING

Multiport

**Umfatandi skipatænastur á einum stað**



Skipamekling

**Keyp og sølu av skipum á altjóða skipamarknaðinum.**



Skipaníkstur

**Rakstur av skipum í Føroysku Altjóða Skipaskránni.**



Skipaumboðan

**Dygdargóð tænasta til skip í føroyskum havnum, alt samdøgrið.**

Niels Finsensgøta 23 • P.O. Box 1252 • FO - 110 Tórshavn • Faroe Islands • torship@post.olivant.fo • www.torship.com

PUMA

**Cellerator GCI I FG**
Stødd: 6-11+12
**1.499,-**



**King GC FG JR.**
Stødd: 28-35
**499,-**



**Volante GC I FG JR.**
Stødd: 28 - 35
**499,-**



# P/F THOMAS DAM

ÍTRÓTTUR á Glyvrum - Glyvravegur - Glyvrar - tel. 44 73 99 - fax 44 73 97
ÍTRÓTTUR - N. Finsensgøta 5 - FO-110 Tórshavn - tel. 355 300



# BAADER®

Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu.

Nú umboða vit eisini Fomaco saltsproytur.

## P/F Petur Larsen



# ÁRSINS ÍF'ARI 2002

## ROY BESTUR ÍMÓTI LÍF NÆSTSEINASTA VIKUSKIFTIÐ



Í 1-1 javnleikinum ímóti LÍF næstseinasta vikuskiftið vóru ikki serliga nógvar atkvøður. Men tey sum greiddu atkvøðu vóru rímuliga samd um at Roy var bestur. Fyri tað fær hann (og Súsanna) ein døgurðabita fyri tvey frá Pól á Muntra. Vit ynskja honum tillukku!

**Atkvøðutal**

| | ÍF-LÍF | Íalt |
|---|---|---|
| Roy Róin | 28 | 52 |
| Rúni Joensen | 14 | 20 |
| Eyðolvur R.-Petersen | 12 | 98 |
| Høgni Zachariassen | 10 | 80 |
| Hanus Ellasen | 2 | 2 |
| Sverri Ellingsgaard | 2 | 64 |

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig.

Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

### VINNINGAR

- Ársins ÍF'ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen.

**HARALDSEN**
- titt keyp -

## Atkvøðuseðil

Dystur: __________

Nr. 1 (5 stig): __________

Nr. 2 (3 stig): __________

Nr. 3 (2 stig): __________

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: __________ Tel.: __________





# TOPPDYSTURIN, SUM GJØRDIST BOTNDYSTUR!

**Liðini, sum hittast í dag, vóru, áðrenn kappingina, millum bestu boðini uppá uppflytingarevni í ár. Tí skuldi dysturin í dag verið toppdystur. Men, hvussu er nú!!!**

Seinastu mongu árini tá vit hava hitt sumbingar í 2. Deild, hevur talan verið um toppdyst í deildini. Tá kappingin byrjaði í ár høvdu flest øll væntað, at tað aftur fór at verða soleiðis. Men so er ikki! Hvørki av liðunum hevur megnað at fingið tað burturúr, sum var væntað frammanundan kappingina. Hjá sumbingum hevur tó gingið heldur betur enn hjá okkum. Teir liggja á einum fjórða plássi við átjan stigum, meðan vit liggja á einum áttanda plássi við fjúrtan stigum. Dysturin í dag er tí ógvuliga týdningarmikil fyri bæði liðini. Sumb-ingar eru helst nøgdir við javnleik, tí so er stiga-munurin tann sami eftir dystin, nevniliga fýra stig. Vinna vit dystin, er eitt stig á muni, og knapp-liga spenningur aftur í kappingini. Tapa vit hinvegin dystin í dag, stendur ikki væl til. Tá fara sumbingar heili 7 stig framum okkum, og megna teir helst at halda hesa frástøðu. Og skuldi tað hent seg, at tey bæði liðini niðanfyri okkum, VB og HB, vinna sínar dystir í dag, ímóti ávíkavist LÍF og NSÍ, fara teir framum okkum, og vit enda harvið á einum 10. og aftasta plássi.

Verður síðan hugt eftir dystarskránni tað sum eftir er av kappingarárinum, kann sigast, at vit hava rættuliga torførar dystir eftir. Úti ímóti B71, KÍ og HB og heima ímóti VB og FS Vágum. Øll hesi liðini hava nakað at leika fyri, tí munurin millum liðini er so lítil á stigatalvuni.

Vit hava tíverri ikki allar leikarar tøkar til dystin í dag. Tórstein er leikbannaður, eftir at hann fekk sítt triðja gula kort í ár seinasta vikuskiftið. Ken, sum hevur verið við seinastu dystirnar, er skaddur, og verður tí ikki við. Hin-vegin verður venjarin, Pauli, sjálvur helst á miðvøllinum í dag. Venj-ingarstøða hansara er kanska ikki tann besta, men við teimum roynd-um, sum hann hevur, fer hann uttan iva at skapa eina ávísa tyngd á miðvøllinum. –Hann hevur gott yvirblikk, og kann leggja avgerðandi sendingarnar, sum kunnu tryggja okkum ein sigur í dag. Hvørjir verða afturat honum á mið-vøllinum er óvíst, men okkara boð er Høgni Z, Hanus og Eyðun.

Ein av stóru trupulleikunum hevur verið ótryggleikin í verjupartinum. Besta prógvið um tað, eru mongu málini vit hava latið inn. Heili 26 mál hava mótstøðuliðini skotið, og tey hagtølini má eisini gerast okkurt við. Helst fara John, Viggo, Roy og Sverri at manna miðverjuna í dag. Serliga John og Roy hava verið tryggir, tá teir hava leikt í verjuni, og lat okkum vóna at teir eisini verða tað í dag.

Í álopinum gita vit, at Rúni og Heini verða. Teir hava skotið nærum helmingin av málunum hjá okkum í ár, og tí er upplagt, at teir byrjað inni. Tí verður ikki pláss fyri Høgna á Lakjuni í byrjunaruppstillingini. Úslitið kunnu vit eisini bara gita okkum til, men vit fara ikki at geva nakað alment boð, tí tað tora vit ikki. Vit ynskja tykkum bert góða eydnu og ein góðan dyst.




**Tannlæknastovan**

við
***Steintór Larsen,***
***tannlækna***
og
***Brynhild Mariu***
***Lamhauge,***
***tannrøktara***

Torkilskrókur 8
530 Fuglafjørður
tel. 444 358









GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71




NISSAN ALMERA · GÓÐAN TÚR

Tann nýggi Almera. Bygdur og sniðgivin av einari orsøk – fyri at hjálpa tær at lúka øktu krøvini frá nútímans tilveruni. Og tað er ein bilur, sum tú kanst líta á. Hann megnar allar støður frálíka væl.

% Meinhardt Arge

# Fuglafjørður



býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**fuglafjarðar kommuna**

tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo





Hegn
15 ára royndir við tí grøna hegninum!
TEL 31 14 00
Landsins største veitari
Seyðahegn • Gásahegn • Hønsanet
Maskinflætningur • Úrtagarðshegn
P/F THOMAS DAM
Á HALSI • HEYKAVEGUR 1

Besta pizza'in í býnum
PrimaVera
Kambsdalur
tel. 444 446





**Soleiðis slættar tú fíggjarligar sjógvar**

Við Heildarkontu fært tú eitt gott yvirlit yvir tín búskap. Tú rindar eitt javnt, fast gjald um mánaðin. Sparikassin syrgir fyri, at tínar rokningar verða goldnar til tíðina. So einfalt er tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

# TAÐ ERU IKKI
# BARA VIT SUM HAVA HILDIÐ FRÍ!

**Úrslitini - sum ikki hava verið serliga góð - seinastu umførini, hava havt við sær, at vit nú eru í vanda fyri at flyta niður. Hetta var als ikki málið fyrr í ár. Vit spyrja, um menn halda frí enn?**

Frítíð er góð, er ov nógv frítíð so nógv betur??? Kanska!! Men ikki í fótbólti! Tað prógva úrslitini hjá okkara monnum seinastu dystirnar. Ov nógv frítíð – kanska ikki í orðsins sanna týdningi - men teir slappa av, tá teir ikki skulu. 6-0 vesturi í Vágunum, 2-1 í Runavík, 1-1 móti LÍF á heimavølli og seinasta vikuskiftið taptur teir 5-1 ímóti næstbesta liðnum hjá B36. Alt úrslit, sum vit ikki eiga (og tola) at leggja rygg til.

Tá kappingarárið byrjaði var málið at røkka bestu deildina. Men hetta er – eftir vánaligu úrslitini seinastu umførini – langt síðan avskrivað. Og ístaðin fyri at kappast um bestu plássini í deildini liggja vit nú og grópa í botninum, har vit stríðast at halda okkum í deildini. Tað kann ikki vera rætt! Eitt er at liggja niðalaga á stigatalvuni, men at gera – loyvi mær at brúka orðið, tí úrslitini tala fyri seg – ein "forkølaðan" innsats nærum hvønn dyst seinastu umførini, tað kunnu tit ikki vera "betjentir".

Hvar orsøkin til vánaligu úrslitini liggur, ella hvør hevur ábyrgdina, ætla vit okkum seta nøvn á her. Tær eru helst fleiri, men vit vilja vísa á ymiskt, sum í øllum førum hevur havt við sær, at vit nú eru staddir, har vit eru.

-Fyrsta treytin fyri at røkka einum málið, er at allir kenna málið, og vilja verða við at røkka hesum. Venjarin hevði eitt mál áðrenn kappingina, men høvdu leikararnir somu mál? Haldi ikki, tí fyri okkum sær út sum um at fleiri av leikarunum eru nøgdir við støðuna, sum hon er. Nøgdir við at liðið hjá teimum, ÍF, liggur í botninum av næstbestu – ja, næstbestu – deildini í Føroyum. Er tað nakað at vera stoltur av? Eg spyrji bara!

Og hvat við nevndini? Hevði hon somu tráan eftir málinum, sum venjarin hevur stungið út í kortið? Veit ikki! Men um málini skulu røkkast, má alt hetta ganga upp í eina eind, og hesa eind mugu øll kenna. -Ikki bert venjari ella nevndin. Nei, øll, sum eru knýtt at liðnum og felagnum. Haldi, at her manglar nakað. Veit væl, at liðið hevur mist nakrar lykla-leikarar í mun til seinasta kappingarár, samstundis sum fleiri av liðunum í aðru deild eru sterkari í ár. Men so er at gagnnýta tað tilfarið, sum er. Og tað halda vit eisini, at vit ikki hava verið nóg góðir til.

-Hví flytir t.d. ein leikari sum Høgni Madsen – við fótbóltsevnum sum fáur - til GÍ í summarsteðginum? -Hví hevur nevndin ikki gjørt sáttmála við ungu og mest evnaríku leikararnar? Hesir skulu tryggjað okkum fótbólt á

*(framhald á bls. 31)*






## TÚ

**Navn:** Viggo Johannesen
**Føðingardagur:** 05.06.1979 (tað var tá ið ÍF vóru Føroya meistarar)
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** Datamatikari hjá Kalli
**Pláss á vøllinum:** í miðverjuni
**Hædd og vekt:** 185 cm og 84 kg
**Yvirtrúgv:** Nei
**3 orð sum lýsa teg:** tolin, trúðugtur og skjótur
**Torførast mótstøðumaður:** veit ikki
**Frítíðarítriv:** Fótbóltur
**Vónir fyri 2002:** vónandi blanda okkum uppí toppin aftur

## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** onkuntíð í 1996
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** 1992
**Aðrar ítróttargreinar:** eingin
**Minnigarríkasti dystur:** veit ikki
**Størstu fótbólstliga ávirkan:** Torstein, áðrenn hann bleiv so skallutur
**Besti fótbóltsleikari:** Zinedine Zidane
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Karate
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** venjing við bólti, kanska millum tvey mál
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** renning í kava
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Fabien Barthez, John O'Shea, Rio Ferdinand, Mikael Silvestre, Gary Neville, Juan Veron, Roy Keane, David Beckham, Zinedine Zidane, Ryan Giggs, Ruud Van Nistelrooyij (hann hevur ikki skil fyri fótbólti, red.)

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** Grillaður búffur við einari góðari sós
**Slag av tónleiki:** næstan alt
**Sjónvarpssending:** fótbóltssendingar, helst har Tórður Mikkelsen er vertur
**At slappa av:** heima saman við konuni
**Troyggja nr.:** Nr. 4 - sjálvandi
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Pelé
**Sjónvarp/filmstjørna:** Sean Connery
**Besta bók/blað:** Anders And

Fuglafjarðar Keypsamtøka

Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895

JÓNA DANSAR Í LONDON ...men

hon hevur framvegis
eitt gott samstarv
við Føroya Banka!

kontoIN
okkara ungdómskonto

petur & petur - 320870





R Spf
REKLAMUPRENT
Tel. +298 44 20 42 Fax. +298 44 21 42

HUGSKOT
DESIGN
LAYOUT

SKELTIR
BILREKLAMUR
TEXTILPRENT
VEGSKELTIR
PICTOGRAMMIR
FOLIESTAVIR

HEILDARLOYSNIR

ONLY
VERO MODA

Vælkomin í
KATO
Fuglafjørður

Danny Transport

Tel. 31 91 92

Flutningur um allan heim!

Heimavirkis søla og framsýning

Piddasa handil

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

Gallari Ribarhús

Opið er:
mán.-frí: 15.00-17.30
leyg.: 11.00-13.00

Tel. 444 427



*(framhald frá bls. 2)*

av, um felagið hevur eitt stórt fíggjarligt yvirskot, um prísurin fyri tað, verður eitt lækkað ítróttarstøði – har besta lið okkara er í triðjudeild. Hetta er eitt mál, ið ÍF–nevndin er noydd at taka til viðgerðar, ongantíð ov skjótt.

Tó skulu vit ásanna, at tað er ikki langur frástøðan millum liðið á triðniðasta plássi og liðið á næstovasta plássi – 4 stig, so nógv kann henda tað, ið eftir er av kappingini. Kravið er, at ÍF-liðið vísir seg frá síni bestu síðu og at viðhaldsfókið stuðlar teimum.

Dysturin í dag er ímóti Sumba. Sumbingar hava so mangan víst , at teir megna bert teir vilja. Og er tað nakað, teir eiga, so er tað viljin. Mitt í sekstiárunum róðu teir kapp við tíggjumannafari, og nógvar sigrar vunnu teir. Og í fótbólti hava teir mong góð úrslit at vísa á, og í ár byrjaðu teir eisini rættiliga væl. Men teir, eins og okkara lið, eru í einum aldudali. Seinasta vikuskifti vórðu teir avsmurdir av sandoyingum heili 7 –1. -Eitt úrslit, ið mong høvdu ilt við at trúgva, tá ið útvarpið bar tíðindini. Men satt var tað.

Vit vænta ein góðan dyst millum sumbingar og fuglfirðinar, tvey lið, ið skulu stríðast fyri at verða verðani í 2. deild, og samstundis stríðast fyri at røkka møguleikanum at leika um uppflyting í bestu deildina – tí FS Vágar hava so gott sum longu nú tryggjað sær beinleiðis uppflyting. Í Sumba endaði dysturin millum somu lið við javnleiki 1-1.

ÍF–liðið hevur tann fyrimun hesaferð, at tað er ein heimadystur, og vit ivast ikki í, at spælarar okkara hesaferð fara at sannføra sínar áskoðarar um, at liðið hoyrir heima í betra endanum í 2. deild, og tað gera teir við at vinna á sumbingum.

Gòðan dyst!

**NÆSTI HEIMADYSTURIN ER**
**leygardagin 14. september ímóti VB**



**Álvaskot**
Fysioterapiviðgerðarstova
v/Álvi Hansen
530 Fuglafjørður
Tel. 44 51 44








P/F Poul Michelsen
Hoyviksvegur 74, P.O.Box 200, FO-110 Tórshavn
Tel +298 31 46 50, Fax +298 31 81 63, e-mail: pm@pm.fo



**Altíð nýbakað breyð**

Sunnumorgnar fæst breyð á hesum støðum:

Statoil í Leirvík
Hjá Halluri í Gøtu
Hjá Rannvá í Søldarfirði
Statoil í Saltangará
Kiosk Vár í Saltangará
Statoil á Strondum

Handilin er opin soleiðis:
Mán - leyg: 07.00-12.00
Sun: 08.30 - 10.30


**BREYÐMOLIN**
530 Fuglafjørður - tel./fax 444 388





**Salong Yndi**
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490



Damu- og harraklæðir

Klæðir til ung og eldri

**ANNA**
530 Fuglafjørður
tel. 444 899

## Fiskamjøl



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

## Fiskalýsi



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

## Fiskafóður



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

## Uppisjóvarfiskur



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.


HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**

Havsbrún Ltd. • 530 Fuglafjørður
tel. 444 100 • fax 444 160
havsbrun@havsbrun.fo
www.havsbrun.fo







# Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:
- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jormund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)
☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jjuul@post.olivant.fo

# ORKUSPARANDI STOYPIJARNSKETIL

**Logica ketilin er ein av teim førandi stoypijarnsketilinum á marknaðinum. Brúk verður tikið av ný tøkni innan orkusparing, ið tryggjar kundanum tann bíligasta raksturin.**




**Ketilin er lættur at reinsa, og er ljóð isoleraður**





Tekningin her vísir hvussu gongdin hjá roykinum er gjøgnum ketilin. Dentur verður lagur á at ongin hiti fer til spillis.

**Leysar roykforingar eru við til at økja um bíligan rakstur**



**VVS HORNIÐ spf**

**Landavegur 2 . Tórshavn**
**Tel 318023 / Fax 310963**
**vvshorni@post.olivant.fo**

# Leiga buss??



Vit hava ein buss til 16 persónar.
Harav serútgjørdur til 8 ferðandi í rullustóli.
Vit eru altíð til reiðar at samráða eina nøktandi loysn fyri báðar partar.

**Andreas Poulsen**
Syðrugøta tel. 22 52 20 ella 44 17 20

*Reiðari innan frakt- & sandbátar*
*Krana- og lastvognskoyring*
*Sandsøla*

**SANDGREVSTUR**

Stovnað 1949

530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921

Landsins **størsta** og **besta** úrval av ítróttarheiðursgávum

- Steyp
- Heiðursmerki
- Heiðursbrøv
- Toy við búmerki
- Streamers
- Klistrimerki
- Seruppgávur við gravering

Vit seta **títt** búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað

FA. **EILIF ARGE**
KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK
TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76

# Lastvognskoyring




**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

**Kári Zachariassen**
530 Fuglafjørður
tel. 444 245 ella 217 245

# DAEWOO bilar við smáum prísum...



Lanos 138.000,-

Matiz
Tacuma
Nubira
Leganza

DAEWOO

*(framhald frá bls. 4)*
onnur fimleik, spældu fótbólt, kurvabólt ella flogbólt. Hildigarð, sum var við sum umboð fyri ÍF, bar eisini skjótt so í bandi, at ein plintur var settur upp sum borð og nakrir krakkar sum stólar, so til bar at spæla kort. Nógvir krossar vórðu spældir á túrinum, og fleiri av gentunum vóru garvaðir sjavsspælarar.

Mikudagin fóru øll ein túr í Tivoli. Veðrið var gott, so genturnar stuttleikaðu sær óført. Um kvøldið vandu genturnar – hetta mest fyri at venja tær við at spæla á grasi.

**Kappingin**

Hósdagin 25. juli byrjaði kappingin við innmarsji á Lindholm Stadion. Uml. 800 børn og ung vóru við í kappingini. Fyrsti dystur hjá ÍF var í móti einum norskum liði. Spenningurin var stórur á øllum undan dystinum, tí eingin visti, á hvørjum støði okkara gentur vóru í mun til hini liðini. ÍF genturnar spældu væl henda dystin, men hóast hópin av málmøguleikum eydnaðist tað teimum ikki at fáa mál, og tær taptu dystin 1-0. Hinar dystirnar í innleiðindi umfarinum vunnu tær ávikavíst 8–0, 1-0 og 7-1, so tær end-aðu á 1. plássi í bólkinum við 9 stigum og málmun-inum 16–2 og komu tær sostatt í finaluna.

Tær, ið skutu málini í bólkaspælinum vóru hesar:

| | |
|---|---|
| Nikolina Kristiansen | 7 |
| Erla Róin | 3 |
| Halda | 2 |
| Ragnhild | 2 |
| Malan Kristina | 1 |
| Guðrun Lervig | 1 |

**Finalan**

Sunnudagin 28. juli var mest spennandi løtan á túrinum, tá genturnar skuldu spæla finaluna móti Stange IK úr Noregi. Veðrið var so avgjørt ikki til fyrimuns fyri okkara gentur – uml. 30 hitastig, men tær stríddust allar sum ein, og seint í fyrra hálvleiki legði Erla Róin ÍF á odda 1-0. Miðskeiðis í seinna hálvleiki var Erla aftur upp á spæl og setti bóltin í netið til 2-0. Stutt fyri leiklok fekk Stange eitt mál, eitt sera gott langskot, sum gjørdi at seinast løtan var í so spennandi og drúgv, men ÍF genturnar vardu væl hesa seinastu løtuna og høvdu eisini okkurt álopið, so endaliga úrsliðið gjørdist 2-1, og ÍF-gentur vunnu gull í donsku kappingini.

Sigast má, at bæði tey í ferðalgnum og teir áskoðarar, ið vóru komnir at hyggja at ÍF henda dagin, vóru stolt, tá tær 15 genturnar fóru upp á skammilin eftir stóra steypinum. Stóri dagurin varð hildin í Fårup Sommerland, og sigast má, at tað var ein glaður bólkur, ið fór í posarnar hetta kvøldið.

Um 6-tíðina morgunin eftir gekk leiðin heim aftur. Fyrst við toki til Keypmannahavnar og síðan við flogfari til Føroya, og sigast má, at móttøkan var góð. Fyrst á flogvøllinum, har foreldur og onnur vóru møtt við fløggum, og síðan á keiini í Vestmanna, har genturnar vórðu heintaðar.

Ein væleyðnað ferð, bæði ítróttarliga og annars, var at enda komin.





# HAGTØL & FAKTA

## STØÐAN 2. DEILD MENN - 21. juli

| Lið | Dyst | V | J | T | Mál | Stig | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. FS Vágar | 12 | 8 | 3 | 1 | 38-8 | 27 | 6-0-0 | 1-3-2 |
| 2. B36 | 12 | 5 | 4 | 3 | 17-17 | 19 | 2-3-1 | 3-1-2 |
| 3. B71 | 12 | 5 | 3 | 4 | 21-11 | 18 | 3-2-1 | 2-1-3 |
| 4. Sumba | 12 | 5 | 3 | 4 | 19-20 | 18 | 2-2-2 | 3-1-1 |
| 5. KÍ | 12 | 4 | 4 | 4 | 17-17 | 16 | 2-2-2 | 2-2-2 |
| 6. NSÍ | 12 | 5 | 1 | 6 | 13-20 | 16 | 4-0-2 | 1-1-4 |
| 7. LÍF | 12 | 4 | 3 | 5 | 20-20 | 15 | 2-1-3 | 2-2-2 |
| 8. ÍF | 12 | 4 | 2 | 6 | 24-26 | 14 | 3-1-2 | 1-1-4 |
| 9. VB | 12 | 4 | 1 | 7 | 13-34 | 13 | 2-1-3 | 2-0-4 |
| 10. HB | 12 | 3 | 2 | 7 | 16-22 | 11 | 1-1-4 31 | 2-1-3 |

## Málskjúttar

| | |
|---|---|
| Clayton Soares, FSV | 10 |
| *Heini Heinason, ÍF* | 7 |
| Jónsvein Thomsen, B71 | 7 |
| Bjarni Prior, FS Vágar | 7 |
| Olgar Danielsen, KÍ | 7 |
| Eirikur Joensen, Sumba | 7 |
| Kristian í Vági, LÍF | 6 |
| Tórálvur Poulsen, B36 | 5 |
| Rúni Petersen, ÍF | 5 |
| Petur Sjúrðaberg, LÍF | 5 |
| Jens Erik Rasmussen, FSV | 4 |

## Málskjúttar ÍF Lands– og steypakappingin

| Leikari | L | S |
|---|---|---|
| Heini Heinason | 7 | 1 |
| Rúni Petersen | 5 | |
| Høgni Zachariasen | 3 | |
| Høgni á Lakjuni | 3 | |
| Eyðolv R. -Petersen | 2 | |
| Viggo Johannesen | 1 | |
| Mortan Thomsen | 1 | |

## Vert at vita

Komandi leygardag 31. august skulu vit leika ímóti einum av uppflytingarevnunum, B71, heima á Sandi.

Næsti heimadysturin verður leiygardagin 14. september, tá vit leika ímóti VB.

3. deild spælir í morgin ímóti Royn heima. Næsta sunnudag, 1. September, spæla teir ímóti HB í Gundadali.

Um tú atkvøður í dag um, hvør er dagsins leikari, so er tú við í lutakastinum um at vinna eitt lambskrov frá Haraldsen. Atkvøðuseðlar eru á síðu 26, ella tú kanst fáa teir í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum undir og beint eftir dystin.

## Kort - landskapping

| Leikari | G | R |
|---|---|---|
| Eyðun Ryggshamar | 1 | 1 |
| Tórstein Joensen | 3 | |
| Eyðolvur R. -Petersen | 2 | |
| Rúni Petersen | 2 | |
| Heini Heinason | 2 | 1 |
| John Thomsen | 1 | |

## Aðrir dystir í dag 2. deild

FS Vágar - B71
KÍ - B36
VB - LÍF
HB – NSÍ

## Dystir í 1. deild 25.08 - 13. umfar

NSÍ - EB/Streymur
KÍ - B68
GÍ - HB
VB - Skála
B36 - TB

## Dystir í 3. deild 25.08 - 13. umfar

FS Vágar - AB
B36 - TB
B71 - B68
GÍ - HB
ÍF - Royn







**JBS-TRÆ Snikkarakjallarin**
Fløtugerði 34
530 Fuglafjørður
Tel. 444 784
Fartel. 21 57 84

**Stórt úrval av steypum og heiðursmerkjum til allan ítrótt**




SP/F LEIVUR ELLINGSGAARD
OPTIK - URSMIÐJUR
Tel. 45 52 03 - FO-700 Klaksvík

***Blómuhandilin***

## *Orkis*

***625 Glyvrar***

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

***tel 44 82 89***
***fax 44 89 89***




E&B
VIRKIÐ

Element- og
Betongvøruvirkið
við Gjógv

tel 423173/445173
fax 444773

e-bvirki@post.olivant.fo



**ALILAKS**

**Føroya Shell**

| | |
|---|---|
| **Tórshavn** | **tel 34 74 00** |
| **Norðoyar** | **tel 45 77 11** |
| **Eysturoy** | **tel 44 87 11** |
| **Vágoy** | **tel 33 27 11** |
| **Sandoy** | **tel 36 17 11** |
| **Suðuroy** | **tel 37 27 11** |

## GENTUR HJÁ ÍF VUNNU
# GULL Í KAPPING Í DANMARK

**Í døgunum 25. - 28. juli var gentuliðið 12-14 ár hjá ÍF í Danmark, har tær luttóku í kappingini Spar Nord Cup, sum varð hildin í Nørresundby.**




Í døgunum 25. – 28. juli var eitt gentulið hjá ÍF við í Spar Nord Cup í Nørresundby. Talan var um gentur 12-14 ár, men av tí at hesar vanliga spæla hálvan vøll í kappingini í Føroyum og í kappingini í Danmark skuldu spæla á heilum vølli, varð neyðugt at læna spælarar úr øðrum liðum hjá ÍF, tríggjar yngri og tríggjar eldri.

Síðst í mai mánaði fóru gentur og foreldur undir at savna saman pening til ferðina. Skipað varð fyri ymiskum tiltøkum, so sum bingo, stuðulsrenning, lutaseðlasølu og køkutombula, umframt at genturnar eisini fingu stuðul frá Fuglafjarðar kommunu og øðrum. Um somu tíð varð venjingin eisini skipað soleiðis, at allar genturnar, sum skuldu til Danmarkar, kundu venja saman eina ferð um vikuna. Tær havа so eisini vant í summarsteðginum. Til hesara venjingar var so dentur lagdur á samanspæl og at læra tær spæl á størri vølli. Í hesum sambandi varð so eisini ein dystur spældur ímóti einum blandaðum dreingjaliði.

**Ferðin**

Týsdagin 23. juli fór ferðalagið, ið taldi 29, avsað til Danmarkar við Atlantsflogi. Ferðin niður gekk væl, og ferðalagið var frammi um 6-tíðina týskvøldið. Liðið var innkvarterað á Gl. Lindholm skole og búði í fimleikarhøll skúlans. Har var gott at vera, tí umframt at sova bar eisini so stak væl til at spæla í høllini. Meðan nøkur hvíldu seg, gjørdu

*(framhald á bls. 26)*





# SPURNAKAPPINGIN

DANSKA SUPERLIGA´IN

## Nógvir føroyingar fylgja eisini væl við donsku superliga´ini. Kanna um tú ein av teimum?

Hesaferð venda vit eyguni móti bestu donsku fótbóltskappingini, Superliga´ini.

Teir fimtan spurningarnir til høgru nerta við nakað av tí, sum superliga´in hevur havt at bjóða síðan hon var sett á stovn. Tú kanst kanna eftir, hvussu væl tú fylgdi við í kappingini, og hvussu nógv tú veitst um hetta evni, við at svara spurningunum. Stigini verða givin soleiðis, at: Svarar tú 1. spurningi rætt, fært tú eitt stig, næsti spurningur gevur tvey stig o.s.fr.

**0-20 stig:** Eingin vón. Antin ert tú ikki áhugaður í fótbólti, ella veitst tú bara einki um evni. Nýt heldur tíðina upp á okkurt annað!

**21-45 stig:** Krevur bata. Tú veits ikki nógv um fótbólt, men tó...

**46-70 stig:** Miðal. Við at fylgja eitt sindur betur við, gongst tær kanska betur næstu ferð!

**71-100 stig:** Væl yvir miðal. Tú eigur at umhugsa tína støðu, sum ítróttarspurnakappingarevni!

**101-120 stig:** Sera gott. Okkum væntar fólk at gera spurningar!

Røttu svarini eru á bls. 31.

Góða eydnu!

### 15 spurningar um Superliga´ina

1. Í skrivandi stund er bert ein leikari sáttmálabundin við eitt Superliga felag. Hvør er leikarin og hvussu eitur felagið?
2. Tveir føroyskir landsliðsleikarar spæla í donsku 1. deild. Hvørjir eru teir og hvørji eru feløg teirra?
3. Tann einasti føroyingurin í ovastu donsku deildini, berjist um pláss á liðnum við ein suðurafrikanara og ein svia, sum júst er keyptur til felagið. Hvørjir eru teir báðir?
4. Hvør er høvuðssponsor hjá ovastu donsku deildini?
5. Danska landsliðið hevur í vikuni spælt landsdyst. Hvørjum var dysturin ímóti, hvat gjørdist endaliga støðan, hvør var 3. málverji fyri fyrstu ferð og hvørjum felagið leikar hann fyri?
6. Toppskjúttararnir í donsku kappingini í fjør vóru tveir í talið. Annar gjørdi av at skifta felag, til hetta kappingarárið. Hvørjir vóru toppskjúttararnir í seinasta kappingarárið, og hvat felag leika teir fyri nú?
7. Hvussu eitur heimavøllurin hjá AB?
8. Hvussu eitur venjarin hjá AaB?
9. Ein áleypari úr FC Midtjylland er fyri stuttum seldur til eitt týskt felag. Hvør er leikarin og hvat er felagið talan er um?
10. Hvør vann donsku steypakappingina í seinasta kappingarárið (2001-02)?
11. "Den Røde Ronaldo" er eyknevnið á donskum spælara, ið bleiv toppskjútti í kappingarárinum 1994-95. Eftir hetta góða kappingarár leitaði hann sær til felag í Bretlandi at spæla. Hvør er leikarin vit sóknast eftir, hvørjum spældi hann við í 1994-95, hvat var felagið í Bretlandi og hvar spælir hann nú?
12. Av teimum 12 liðnum í ovastu donsku deildini, eru 3 lið, ið ongantíð hava vunnið danska meistaraheitið. Hvørji?
13. Tveir danir vóru við til at døma í HM-endaspælinum. Annar slapp snikkaleysur frá uppgávuni, meðan hin bleiv heimsendur eftir eina "skandalu døming" í dystinum Italia-Croatia. Hvussu eita teir báðir?
14. Ein eystureuropeiskur málverji spælir í ovastu donsku deildini og hevur verið ímillum teir bestu í nøkur ár. Hvør er hann, hvar er hann frá og hvat felag leikar hann fyri?
15. Hvat er elsta felagið og hvat er yngsta felagið í ovastu donsku deildini?

**Tilfar til umvælingar, ábøtur ella annað.... ....spyr fyrst hjá okkum!!**

## Fuglafjarðar Timburhandil

tel. 444 126



(Gardintoy
(Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

## Toy & Tógv · 530 Fuglafjørður · tel. 444 494






**HYDRAULIK**
**RÁÐGEVING**
**VERKÆTLANIR**
**ÍSETANIR**
**UMVÆLINGAR**
**MASKINUMVÆLINGAR**
SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING



### Á goymslu:

Hydr, slangur og fittings, hydr, rør og fittings, (manovri- og kúluventilar, kúlu-leigir, hydr. filtur, smyrji- og brenniolju-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.

### Sølu-og tænastuumboð fyri:

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispøl)
- Rapp Hydema Syd (garna- og linuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælmotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brenniolju og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (ídnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

## KJ-HYDRAULIK

**P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður**
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fax 444 636

# ÍF - Sumba

**13. umfar í landskapp-ingini hjá 2. deild monnum**
**24. august 2002**

## Leikskrá 7


**Útgevari:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd:**
*Signar á Brúnni*
*Birgar Larsen*
*Rógvi Róin*

**Myndir:**
*Álvur Haraldsen, Sosialurin*
*Rógvi Róin*

**Kápumynd:**
*Rúni Petersen roynir at trýsta Páll Holm Johannesen, B36, sum tó hevur fingið sparkað bóltin burtur. Myndin er frá dystinum í Gundadali ímóti B36 seinasta vikuskiftið, sum vit tapti 5-1*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Prent:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting:**
*Rógvi Róin*




# ? SUMBINGAR OG FUGLFIRÐINGAR Í EINUM ALDUDALI!

Fuglfirðingar, ið hava áhuga fyri ítrótti, vænt-aðu sær nógv av ÍF-liðnum í 2. deild í ár. Eingin ivaðist í, at liðið fór at liggja á fyrsta ella øðrum plássinum í 2. deild. Hópin av góðum spælarum áttu vit, tá ið kappingin byrjaði ,og øll høvdu stórt álit á venjar-anum, ið altíð setir sær høg mál.

Men dygdin í dystu-num, hevur verið sera misjøvn. -Viðhvørt spælt sum eitt gott fyrstudeild-arlið fyri síðani at spæla sum eitt fimtudeildarlið – og hetta, hóast fólkið hevur verið tað sama.

Trúgvu áskoðararnir hava verið ørkymlaðir av teimum misjøvnu úrslitu-num. Hvat er tað, sum bagir liðnum? spyrja fuglfirðingar.

Seinastu úrslitini hava verið syndarlig. At tapa heili 5-1 móti B36 liðnum í Havn mundi vera botnu-rin. Tá ið vit eru so av-gjørdir í orð og talu, so er tað tí, at vit hava sæð hetta sama B36 liðið spælt í Fuglafirði, og hóast teir vunnu tann dystin, so spældi okkara lið munandi betur enn B36-liðið, og úrslitið átti at verið eitt heilt annað. Tí gjørdist hvøkkurin so mikið størri, tá ið tað frættist, at okkara menn høvdu stórtap móti B36-liðnum í Havn.

Við fleiri ósigrum á rað, er lið okkara komið sær í stóran vanda. Vit liggja sum triðvánali-gasta liðið í 2. deild og vandi er fyri, at liðið dett-ur niður í 3. deild (har hava vit lið frammanun-dan). Tað kann og skal ikki henda, hugsa allir fuglfirðingar, ið eru góðir við ítróttin.

Somuleiðis vita teir, at vit eiga nógvar framúr góðar ungar spælarar, ið hava framtíðina fyri sær, sum fleiri onnur ítróttarfeløg fara at venda sær til, fyri at styrkja sítt lið í bestu deildini. Og ikki kunnu vit siga okkara spælarar ringar fyri tað, um teir taka ímóti slíkum til-boðum, um teir fáa nakrar krónur afturfyri – tað er júst tað, ið hendir í dag.

Tað er lítið at reypa

(Framhald á bls. 26)





*(framhald frá bls. 28)*

høgum støðið í bygdini í framtíðini? Vit eru vísir í, at fleiri av ungu og evnaríkastu leikarunum, sum felagið eigur, fara til onnur feløg í Føroyum, um ein ætlan ikki verður løgd, hvussu fótbólturin skal skipast og mennast í bygdini. Tí vilja vit heita á nevndina at taka hetta upp beinanvegin.

-Árið í ár er nærum farið afturum, men vit mugu tryggjað okkum, at vit ikki flyta niður – tað vildi verið skomm. Og so er at fara í gongd við at hugsa um komandi ár og framtíðina. –Leggja eina ætlan fyri venjar-unum og leikarunum, har teir greitt fáa at vita, hvørjar framtíðarætlanir nevndin og høvuðs-venjarin hevur við fót-bóltspælinum í bygdini. Tí tað er upp á tíðina, at vit aftur fáa eitt 1. deildarlið í bygdini.

# KIOSKIN ER OPIN - Í OVARU HÆDDINI

Aftur í ár er kiosk í ovaru hæddini í Ítróttar-hús-inum. Kioskin er opin meðan dysturin er, og røsku damurnar í kiosk-ini hjá ÍF selja kaffi, te, køkur og góðgæti.



**Svarini til spurningarnar á bls. 29:**
1. Todi Jónsson, FC København , 2. Chr. Høgni Jacobsen, Vejle og Johan Byrial Hansen, Horsens, 3. Sibusiso Zuma og Jørgen Petterson, 4. SAS, 5. Skotlandi, 1-0 til Danmark og Peter Skov-Jensen, FC Midtjylland, 6. Kaspar Dalgas (fyrrverandi OB) og Peter Madsen, Brøndby, 7. Gladsaxe Stadion, 8. Poul Erik Andreasen, 9. Morten Skoubo, Bor. Munchengladbach, 10. OB, 11. Erik Bo Andersen, Aab, Glasgow Rangers og er nú aftur í Aab, 12. Viborg, FC Midtjylland og Farum, 13. Kim Milton Nielsen og tann óhepni Jens Larsen, 14. Arkadiusz Onyszko, Póllandi og Viborg FF, 15. Aab, 13. mai 1885 og FC Midtjylland, 1. juni 1999


**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**


***Aðalnevndin:***
Formaður
Hjalti Lundsbjerg, tel. 444 079
2. formaður
Jóhan Símun Joensen, tel. 224 224
Peningarøkil:
Hildigarð Eliasen, tel. 444 052
Skrivari:
Høgni á Lakjuni, tel. 444 418

***Fótbóltsdeild:***
Formaður:
Símun Fornagarð, tel. 444 344 / 22 07 70
Ólavur Larsen, tel. 22 46 59
Mortan Nónsgjógv
Hildigarð Eliasen, tel. 444 052 / 25 38 52

***Samskipanarleiðari:***
Tel. 22 87 71

***Venjarar:***
***2. deild:***
Pauli Jarnskor, tel. 441 353
***3. deild:***
Ólavur Ellingsgaard, tel. 21 26 86
***4. deild:***
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
***5. deild:***
Kurt Petersen, tel. 22 37 99
***Old Boys:***
Sonni Jensen, tel. 444 975
***Unglingar:***
Birgar Larsen, tel. 25 38 74
***Dreingir Ø.:***
Ólavur Larsen, tel. 22 46 59
***Smádreingir Ø.:***
John Thomsen, tel. 25 02 69
***Piltar 1/2 v a-b.:***
Ragnhard Petersen, tel. 444 353
***Smápiltar a-c:***
Jákup Baldvinsson, tel. 444 645
***Gentur:***
Jenny Niclasen, tel. 25 07 09
***Smágentur:***
Durita Djurhuus, tel. 44 50 24
***G.10-12 ár:***
Jóhan Símun Joensen, tel. 224 224
***Pinkur:***
Fríða Næss, tel. 26 09 72

# Heildarveiting av tí heimskenda merkinum HP (Hewlett Packard)





HEWLETT® PACKARD
Expanding Possibilities

**Alt innan heimateldur, virkisteldur, servarar, prentarar, net og mangt annað....**

**Avtala um viðlíkahald av teldum/teldukervi kann gerast út frá tygara tørvi.**

**Arbeitt verður fyri virkir, skúlar og stovnar.**

Fast internetsamband til privat/virkir og stovnar, fyri einans 515,- u/MVG pr. mðr.

## Atlantic Online Sp/f

Í Støð 8
FO-530 Fuglafjørður
Tlf: +298 444487
e-post: atlantic@online.fo






Eisini hava vit skógvar til børn og vaksin



## TOYSTOVAN

530 FUGLAFJØRÐUR · TEL. 444 637

**guys**
essential fits



®501®
L Authentique
Original Jeans
Levi's® RED TAB®



Standard Bootcut
Coupe Boot Cut
®507
Levi's® RED TAB®



Standard Flare
®516
Levi's® RED TAB®

**girls**
essential fits



Slim Bootcut
®525
Levi's® RED TAB®



Super Low Flare
®544
Levi's® RED TAB®

LEVI'S

Levi's® buksur
1 par
**699,-**
2 pør
**1.200,-**

**VØRDSLAN**
WEARHOUSE

Í Støð · 530 Fuglafjørður · Tel. 444 747

## ÍF — Sumba

1. Rúni Joensen
3. Pauli Jarnskor
4. Viggo Johannesen
5. Heini Heinason
6. Roy Róin
7. Eyðun Ryggshamar
8. Ken Bærentsen
9. Rúni Petersen
10. Høgni á Lakjuni
11. Eyðolvur R. Petersen
12. Bárður Mortensen
13. Tórstein Joensen, liðs.
14. Høgni Zachariasen
15. Hanus Eliasen
16. Fróði Poulsen
17. Hjalti Lundsbjerg
19. Sverri Ellingsgaard
20. John Thomsen

Venjari: Pauli Jarnskor

Liðleiðari: Símun Fornagarð

____ Heini Jacobsen
____ Tryggvi Nielsen
____ Sonne Kjærbo
____ Dánjal J. Joensen
____ Hans J. Thomsen
____ Bjørn Thorsteinsson
____ Jan Poulsen
____ Elian Hansen
____ Hallur D. Joensen
____ Eirik Joensen
____ Johnny Skibenæs
____ Jón Lisberg
____ Páll M. Kjærbæk
____ Suni úr Hørg
____ Solfinn Kjærbo
____ Bergur Vinther

Venjari: Nicola Biberdic

## Dómarabólkur:

**Dómari: Rúni Gaardbo, B68**
**Linjuverjar úr B68**

## Bóltsponsorur: